# Útboðstilfar til kunningar- og lýsingarátøk

## Innihaldsyvirlit

1. Útboðstilfarð til kunningar- og lýsingarátøk fyri Talgildu Føroyar 2019-2020 ..... 2
2. Bakgrund ..... 2
3. Málbólkur ..... 3
4. Ágóðin hjá brúkaranum ..... 3
5. Avsendari ..... 3
6. Endamál við kunningar- og lýsingarátøkum ..... 3
7. Boðskapur ..... 4
8. Avbjóðingar ..... 4
9. Mál ..... 5
10. Stødd og miðlaval ..... 5
11. Tíðarfreist ..... 5
12. Tilboðskrøv ..... 5
13. Vekting ..... 6
14. Kunningarfundur ..... 8
15. Fráboðanarfreist ..... 8
16. Innlatingarfreist ..... 8

Argir, 26. september 2018

# 1. Útboðstilfarð til kunningar- og lýsingarátøk fyri Talgildu Føroyar 2019-2020

Í samsvari við ásetingar um alment innkeyp, ynskja Talgildu Føroyar, sum partur av Gjaldstovuni, hervið at heinta inn tilboð um framleiðslu av kunningar- og lýsingartilfari til Talgilda Samleikan og Tænastuportalin. Talan er um tvær tænastur. Lýsingarnar skulu nýtast saman, og hvør sær eftir tørvi.

# 2. Bakgrund

Talgildu Føroyar er verkætlan undir Gjaldstovuni, ið hevur til endamáls at gera eitt talgilt undirstøðukervi fyri Føroyar. Endamálið við Talgildu Føroyum er at nýtímansgera vælferðina og tænasturnar hjá føroyingum. Talgildu Føroyar skulu vera við til at skapa kappingarføri, vøkstur og framleiðsluorku í Føroyum. Verkætlanin byrjaði í 2015 og skal koyra fram til árslok 2020.

Tað eru fýra høvuðstættir í Talgildu Føroyum. Samleikin, Tænastuportalurin, Grundardátur og Heldin. Heldin er einasta verkætlan, ið longu hevur fingið navn og búmerki. Harumframt hevur Talgildu Føroyar egið brand og búmerki.

Uppgávurnar í hesum útboðstilfari eru knýttar verkætlanunum Talgildi Samleikin og Tænastuportalurin. Navn til loysnirnar er ikki partur av uppgávuni.

Ætlanin við Talgilda Samleikanum er at menna eina felags loysn, ið kann nýtast sum talgild innritan, eyðmerking og undirskrift. Ein talgildur samleiki verður at meta sum samleikaprógv, ið skal gera tað tryggari og einfaldari hjá borgarum at avgreiða síni viðurskifti talgilt. Í fyrstu atløgu verður Talgildi Samleikin útgivin uttan undirskrift. Menningin við undirskriftini er drúgvari, og tí verður hetta klárt seinni á vetri 2019/2020.

Talgildi Samleikin fer at virka á eini app. Neyðugt verður sostatt ikki við einum lyklakorti, sum vit hava kent tað frá NemID. Øll, ið vilja nýta Talgilda Samleikan, skulu taka niður appina, tá ið tey skráseta seg sum brúkara. Tey, ið ikki vilja nýta appina, kunnu fáa eina loysn á USB geyma. Vit vænta og ynskja tó, at tey flestu fara at nýta loysnina á fartelefonini. Tí skal serligur dentur leggjast á lýsingarpartin av appini.

Ætlanin við Tænastuportalinum er at hava eina felags inngongd til talgildar tænastur. Her kunnu almennir stovnar og ávísar privatar fyritøkur bjóða fram sínar tænastur, sjálvgreiðslur og samskifti. Í 2017 yvirtók Gjaldstovan Mínboks frá Elektron og Posta. Hendan skipan verður ein sameindur partur av komandi Tænastuportalinum. Tænastuportalurin fer sostatt at hýsa talgilda postkassanum hjá føroyingum.

Borgarin skal merkja eina betri og skjótari tænastu. Kunning skal verða tøk og viðurskifti kunna avgreiðast, tá ið tað passar borgaranum.

Talgildi Samleikin og Tænastuportalurin verða klár at taka í nýtslu fyrra hálvár 2019. Til tess er neyðugt við einum landsfevnandi kunningar- og lýsingarátaki fyri talgildu loysnunum.

## 3. Málbólkur

Talgildi Samleikin er ætlaður øllum føroyingum, ið hava tørv á einari talgildari innritan ella undirskrift. Tað verður ikki lógarkrav at nýta Talgilda Samleikan, og fólk mugu skráseta seg at nýta hann. Allir almennir stovnar, ið bjóða fram talgildar tænastur skulu nýta Talgilda Samleikan. Peningastovnarnir fara við tíðini eisini at nýta Talgilda Samleikan og tí verða brúkarar av netbankum eisini málbólkur.

Tænastuportalurin er ætlaður teimum føroyingum, ið vilja avgreiða síni viðurskifti við almennu Føroyar talgilt. Tað verður neyðugt at hava Talgilda Samleikan fyri at kunna rita inn á Tænastuportalin.

Eitt av aðalmálunum í Talgildu Føroyum er, at loysnirnar eru brúkaravinaligar og skynsamar fyri øll, íroknað tey, ið bera brek ella eru tøkniliga illa fyri.

## 4. Ágóðin hjá brúkaranum

Ágóðin við Talgilda Samleikanum er, at tað verður bert ein innritan til allar síður og tænastur, ið nýta loysnina. Hetta er ein trygg loysn, ið livir upp til altjóða krøv. Harumframt broytist tænastustøðið, tá ið talgilda undirskriftin verður klár at nýta og tænastuveitarar kunnu fáa skjøl og annað undirskrivað, sum eru juridiskt bindandi.

Ágóðin við Tænastuportalinum er, at borgarar fara til eina og somu inngongd at avgreiða síni viðurskifti við almennu Føroyar – uttan mun til, hvør tænastuveitarin er. Tænastur skulu verða at kenna aftur við at líkjast í sniði og uppseting. Allar tænasturnar eru samlaðar á einum stað. Harumframt verður ein álmanakki, sum allir tænastuveitarar nýta í felag. Tað vil siga, at borgarin fær eitt samlað yvirlit yvir freistir, avtalur o.a. við tað almenna. Harumframt verður samskiftið við Mínboks at ganga ígjøgnum Tænastuportalin, og tað verður ein beinleiðis samanhangur millum samskifti og sjálvavgeiðslurnar.

## 5. Avsendari

Talgildu Føroyar er avsendari. Talgildu Føroyar er verkætlan undir Gjaldstovuni. Talgildu Føroyar eru fíggjaðar av landinum, kommunum og privatum fyritøkum og stovnum.

Talgildi Samleikin verður innritanin hjá almennu Føroyum eins og fleiri privatum tænastuveitarum umframt peningastovnunum.

Tænastuportalurin er eitt samstarv millum Talgildu Føroyar og teir stovnar og fyritøkur, ið fara at bjóða tænastur fram á Tænastuportalinum. Við tíðini fara fleiri stovnar og fyritøkur at leggjast aftrat Tænastuportalinum

Fyrilit má takast fyri tænastuveitarunum í Talgildu Føroyum og teir mugu onkursvegna síggjast aftur í lýsingaátakinum – beinleiðis ella óbeinleiðis.

## 6. Endamál við kunningar- og lýsingarátøkum

Yvirskipaða endamálið við lýsingarátøkum er at kunna og vegleiða føroyingar um nýggju loysnirnar og allar hentleikarnar, ið komast av Talgilda Samleikanum og Tænastuportalinum.

Talgildi Samleikin og Tænastuportalurin skulu ílatast samleikar, sum eru lættir at kenna aftur og kunnu nýtast á heimasíðu, app og kunningartilfari.

Borgarar skulu fáa greiða kunning um, hvussu loysnirnar kunnu nýtast og skulu handfarast.

## 7. Boðskapur

Talgildu Føroyar ynskja at positionera Talgilda Samleikan og Tænastuportalin sum tryggar og góðar loysnir, ið eru partur av føroyska talgilda undirstøðukervinum.

Boðskapurin skal í minsta lagi innihalda:

- Hvat er Talgildi Samleikin og tænastuportalurin?
- Hvat er ágóðin við at nýta Talgilda Samleikan og Tænastuportalin
- Call to action

## 8. Avbjóðingar

Ein stór avbjóðing við talgildum tænastum er, at tað fyri mong ikki tykist viðkomandi. Fleiri borgarar nýta ikki talgildar tænastur og onnur nýta tað bert fáar ferðir árliga. Fólk kunnu í fleiri førum vera fremmandgjørd av talgildu tøknini og kenna tað møðsamt at skula seta seg inn í nýggja tøkni. Fyrilit skal takst fyri teimum ymisku málbólkunum. Byrjanarstøðið hjá brúkarunum er ymiskt. Nakrir málbólkar mugu fáa serkunning, her ímillum limabólkar í MEGN og Landsfelag pensjónista.

Málbólkurin er ógvuliga breiður. Ynskiligt er, at allir føroyingar fara at nýta Talgilda Samleikan og Tænastuportalin, men tað er tó ikki eitt lógarkrav.

Viðvíkjandi Talgilda Samleikanum eru avbjóðingarnar hesar:

Allir brúkarar mugu skráseta seg at nýta Talgilda Samleikan. Hetta verður ein strong mannagongd, ið skal fylgjast. Hetta kann tykjast tvørligt.

Talan verður ikki um eina dagføring av Mínlykil. Krøvini til skrásetingina eru hægri enn hjá Mínlykil. Hetta verður ein nýggj føroysk loysn, ið skal avloysa Mínlykil og við tíðini eisini NemID í Føroyum.

Í fyrstu syftu verður Talgildi Samleikin bert ein trygg innritan og eyðmerking. Menningin við talgildu undirskriftini verður klár árið eftir. Hóast undirskriftin ikki er klár, tá ið samleikin verður førdur inn, skal fyrilit takast til undirskriftina í lýsingarátakinum.

Viðvíkjandi Tænastuportalinum eru avbjóðingarnar, at fleiri borgarar, als ikki avgreiða síni viðurskifti talgilt í dag. Tey óttast at eingin hjálp verður at fáa við sjálvgreiðslum og at tænastustøðið tí lækkar. Haraftrat skulu tey venja seg við, at samskiftið hjá MínBoks nú verður flutt í Tænastuportalin.

# 9. Mál

Yvirskipaða málið við lýsingarátakinum er at fáa so nógvar føroyingar sum gjørligt at nýta loysnirnar, Talgilda Samleikan og Tænastuportalin. Effektin av Talgilda Samleikanum og Tænastuportalinum kann málast í mun til nýtslu av loysnunum.

# 10. Stødd og miðlaval

Lýsingarnar mugu koma út til so nógvar føroyingar sum møguligt.

Talgildu Føroyar hevur ikki eitt útgreinað ynski um, hvat og hvussu lýsast skal, men talgildir miðlar eiga eyðsæð at verða brúktir. Allir málbólkar eru tó ikki eins lættir at fáa fatur á online, og tí mugu aðrir møguleikar takast við.

Vit hava hesar samskiftispallar tøkar: talgildu.fo, gjaldstovan.fo, Facebook, LinkedIn, tíðindaskriv og komandi Tænastuportalurin. Harumframt eru ymiskir tænastuveitarar, almennir og privatir, ið fara at nýta Talgilda Samleikan og bjóða tænastur fram á Tænastuportalinum. Hugsast má tí at teirra samskiftispallar eisini eru tøkir til átøkini.

# 11. Tíðarfreist

Lýsinga- og kunningarátakið skal verða klárt í mars 2019.

# 12. Tilboðskrøv

Tilboðið frá lýsingarstovuni skal innihalda:

- eina framløgu og
- eitt skrivligt tilboð

## Framløgan

Talgildu Føroyar ynskir at lýsingarstovan gevur eina framløgu, ið fevnir um krøvini niðanfyri

- Boð uppá lýsingarátak til Talgilda Samleikan og Tænastuportalin, ið kann nýtast saman og hvør sær
- Boð uppá kunningartilfar til ymiskar málbólkar, t.e. brúkaravegleiðingar osfr.
- Boð uppá miðlaætlan og møguligan avsláttur frá miðlum
- Boð uppá títtleika, hvussu leingi og hvørjir miðlar skulu nýtast

Búmerki til báðar loysnir skal íroknast í tilboðið. Lýsingarstovan skal í framløguni tískil greiða frá, hvussu ætlanin er at loysa hesa uppgávu. Av tí at loysnirnar ikki hava fingið navn enn, er ikki neyðugt (ella gjørligt) at hava uppskot til búmerki við í framløguni.

Framløgan skal lýsa, hvussu lýsingarstovan ætlar at handfara uppgávuna. Harumframt ynskja vit eitt tilmæli um hvussu, hvar og nær lýsast skal.

Framløgan verður hildin fyri starvsfólkum á Talgildu Føroyum. Framløgan kann haldast í hølum hjá lýsingarfyritøkuni ella í Albert Hall, Kvíggjartún 1.

### Skrivliga tilboðið

Lýsingarstovan skal handa inn skrivligt tilboð, sum í minsta lagi inniheldur:

- Fastan prís fyri framleiðslu av tilfarinum knýtt at hesi uppgávu, men ikki lýsingarkostnað.
- Útgreinaðan framleiðslukostnað, men ikki lýsingarkostnað
- Framløguna (t.d. powerpoint)
- CV hjá ráðgeva, ið boðið verður inn við, við kunning um førleikar, útbúgving og royndir
- Royndir hjá lýsingarstovuni við líknandi átøkum

Øll krøvini omanfyri kunnu uppfyllast av einstakari lýsingarstovu ella í samtaki millum fleiri.

### Minstukrøv til tilboðið

Minstakrav er, at tilboðsprísurin ikki er hægri enn 500.000 kr.

Minstakrav er, at lýsingarstovan hevur royndir við líknandi átøkum og kann vísa á hesi átøk og royndir (t.d. landsfevnandi, fyri almennan stovn, tøkniliga tungar loysnir). CV hjá navngivnum ráðgeva skal upplýsast.

## 13. Vekting

Tilboðini verða mett út frá framløguni og skrivliga tilboðnum hjá lýsingarstovuni. Tilboðini verða vektað soleiðis:

- 50 % Prísur, t.e. fasti prísurin, ið boðin verður inn við fyri framleiðslu av búmerki og kunningar- og lýsingartilfarinum knýtt at hesi uppgávu
- 35 % Skapanarevni, t.e. hvussu endamálið við kunningar- og lýsingarátøkunum verður rokkið, og hvussu áhugavert, fangandi og neyvt átakið verður hugsað og formað
- 15 % Serkunnleiki til at geva ráðgeving, sparring og veitingar í sambandi við framleiðsluna og meðan átøkini koyra

### Útrokningin fer fram á henda hátt:

### Prísur (50 %)

Tilboðið við lægsta prísi fær 50 stig.

Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli:

*Tilboð við lægsta prísi / prís í tilboði ið skal metast x 50*

**Lægsti prísurin í frymlinum verður aldri lægri enn 350.000 kr**. Tað vil siga, at bjóðar ein lýsingarstova við einum prísi lægri enn 350.000 kr. verður prísurin ásettur til 350.000 kr. í vektingini.

Prísurin kann ikki vera yvir 500.000 kr., sí minstukrøv.

## Skapanarevni (35 %)

Út frá einari samlaðari meting av framløguni og skrivliga tilboðnum frá lýsingarstovuni, verður mett um, hvussu endamálið við kunningar- og lýsingarátøkunum verður rokkið, og hvussu áhugavert, fangandi og neyvt átakið verður hugsað og formað. Eitt stigatal á einum skala frá 1-35 verður givið.

## Serkunnleiki (15 %)

Út frá einari samlaðari meting av framløguni og skrivliga tilboðnum frá lýsingarstovuni, verður mett um

Dømi um útrokning:

*Prísur*

Tilboð 1: Tilboðið við lægsta prísi er 350.000 kr. Hetta gevur 50 stig.
Tilboð 2: Næstlægsta tilboðið er 400.000 kr. Hetta gevur 350.000/400.000 x 50 = 43,8 stig.
Tilboð 3: Triðlægsta tilboðið er 500.000 kr. Hetta gevur 350.000/500.000 x 50 = 35 stig.

*Skapanarevni*

Tilboð 1: Lýsingarstovan skorar umleið miðal, tí at mett verður, at tilboðið á nøktandi hátt kann náa endamálið við kunningar- og lýsingarátøkunum. Tilboðið er í ávísan mun áhugavert, fangandi og neyvt hugsað og formað. Lýsingarstovan fær 20 stig.

Tilboð 2: Lýsingarstovan skorar hægst, tí at mett verður, at tilboði á sera góðan hátt kann náa endamálið við kunningar- og lýsingarátøkunum. Tilboðið er áhugavert, fangandi og neyvt hugsað og formað. Lýsingarstovan fær 35 stig.

Tilboð 3: Lýsingarstovan skorar undir miðal, tí at mett verður, at tilboðið ikki á nøktandi hátt kann náa endamálið við kunningar- og lýsingarátøkunum. Tilboðið er í minni mun áhugavert, fangandi og neyvt hugsað og formað. Lýsingarstovan fær 10 stig.

*Serkunnleiki*

Tilboð 1: Lýsingarstovan skorar miðal, tí ráðgevarar og lýsingarfyritøkan sum heild hava nøktandi royndir, førleikar, útbúgving og organisasjónin. Lýsingarstovan fær 8 stig.

Tilboð 2: Lýsingarstovan skorar undir miðal, tí ráðgevarar og lýsingarfyritøkan sum heild vantar nøktandi royndir, førleikar, útbúgving og organisasjónin. Lýsingarstovan fær 4 stig.

Tilboð 3: Lýsingarstovan skorar hægst, tí ráðgevarar og lýsingarfyritøkan sum heild hevur tær bestu og drúgvastu royndirnar, førleikarnir, útbúgvingina og ta sterkastu organisasjónin. Lýsingarstovan fær 15 stig.

*Samlað meting*

Tilboð 1: Prísur 50 stig + skapanarevni 20 stig + serkunnleiki 8 stig = samlað meting á 78 stig.
Tilboð 2: Prísur 43,8 stig + skapanarevni 35 stig + serkunnleiki 4 stig = samlað meting á 82,8 stig.
Tilboð 3: Prísur 35 stig + skapanarevni 10 stig + serkunnleiki 15 stig = samlað meting á 60 stig.

**Lýsingarstovan, ið eigur tilboð 2 fær flest stig samanlagt og gerst sostatt vinnari av útboðnum**.

førleikarnar hjá ráðgevanum og lýsingarstovuni sum heild at loysa uppgávuna í sambandi við framleiðsluna og meðan átøkini koyra. Eitt stigatal á einum skala frá 1-15 verður givið

## 14. Kunningarfundur

Talgildu Føroyar skipa fyri kunningarfundi um útboðið 28. september 2018 kl. 11.00 á Albert Hall, Kvíggjartún 1. Útboðið verður lagt fram munnliga og høvi verður at seta spurningar um lýsingar- og kunningarátakið.

Í útboðstíðarskeiðnum ber til hjá lýsingarstovum, hvør einsæris, at biðja um fundir við Duritu Hansen, durita@talgildu.fo um spurningar eru viðvíkjandi uppgávuni. Síðsta freist at biðja um fund er 22. oktober 2018. Allir fundir skulu haldast áðrenn 26. oktober 2018.

Til ber eisini at seta skrivligar spurningar um útboðið og settu krøvini v.m. við telduposti til durita@talgildu.fo seinasta freist er 22. oktober 2018.

## 15. Fráboðanarfreist

Lýsingarstovur skulu við telduposti til Duritu Hansen, samskiftisfólk, durita@talgildu.fo í seinasta lagi 22. oktober 2018 boða frá, um ætlan er at lata inn tilboð og leggja fram. Talgildu Føroyar venda síðani aftur við tíðspunkti fyri framløguni. Saman við fráboðan skal fylgja dømi av líknandi royndum og hvør ráðgevi er knýttur at uppgávuni.

Um fleiri enn fimm lýsingarstovur boða frá ætlan um at lata tilboð og framløgu inn, tilskila Talgildu Føroyar sær rættin at velja út fimm lýsingarstovur út frá mest viðkomandi royndum og ráðgevum. Hesar fimm lýsingarstovur sleppa síðani at hava framløgu fyri Talgildu Føroyum.

## 16. Innlatingarfreist

Freistin at lata inn tilboðið til Talgildu Føroyar er 31. oktober 2018 kl. 12.00. Tilboðið skal sendast við teldupost til durita@talgildu.fo. Lýsingarstovurnar fáa nærri boð um, nær framløgan skal haldast. Framløgurnar verða 1. og 2. november 2018.

Talgildu Føroyar tilskilar sær rættin ikki taka av nøkrum tilboði.

Vinaliga

Talgildu Føroyar

Durita Hansen
Samskiftisfólk

durita@talgildu.fo
tlf. 50 43 67